## Rógvi tapti fyri Tromsø

Rógvi Jacobsen spældi á miðvøllinum, tá ið íslendsk felag hansara spældi fyrsta dystin í La Manga Cup mánadagin. Dysturin var ímóti norska felagnum Tromsø, og norðmenn vunnu 1-0. Einasta málið í dystinum kom eftir ein slakan tíma. Rógvi spældi allan dystin, og hesaferð royndi venjarin hann á tí sentrala miðvøllinum. Næsti dysturin hjá KR í La Manga Cup er hósdagin.

## Janus fyri Christian

Christian Restorff Mouritsen hevur givið avboð til venjingarleguna hjá a-landsliðnum í fótbólti. Tann 19. februar fer til landsliðið til Florida, men Manchester City vil ikki lata Christian fara við landsliðnum. Tí hevur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, sent boð eftir HB-verjuspælaranum Janusi Joensen. Hann er 24 ára gamal, hevur verið tikin út til landsliðið áður, men hevur ikki spælt nakran skrásettan landsdyst enn.

## Ingi og teir eru í kreppu

Tað gongur illa hjá enska felagnum Birmingham í løtuni. Ingi Højsted hevur ikki spælt fyri besta liðið enn, men liðfelagarnir hjá honum eru í tungum sjógvi. Mánakvøldið spældi Birmingham í London, og har vann West Ham 3-0. Birmingham liggur undir niðurflytingarstrikuni í Premier League, og West Bromwich, sum liggur frammanfyri teir, hevur heili seks stig fleiri.

## Mourinho í øðini

Venjarin hjá Chelsea, José Mourinho, var í øðini, eftir at liðið hjá honum tapti 3-0 fyri Middlesbrough um vikuskiftið. Hetta er størsta tap hjá Chelsea, síðani Mourinho kom til felagið. Verjuspælarin Carvalho sigur fyri einum enskum blað, at Mourinho var í øðini eftir dystin, og hann var meira vónbrotin av hugburðinum hjá spælarunum enn tapinum sjálvum. Chelsea er framvegis langt fremst í Premier League.

# B36 fingið nýggjan formann

**Sjúrður Norðbúð er nýggjur formaður í B36, eftir at Kjartan Mohr ikki tók við afturvali á aðalfundinum mánakvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Mánakvøldið takkaði Kjartan Mohr fyri seg sum formaður í B36. Ársaðalfundur var í B36, og har tók Kjartan ikki við afturvali. Hann segði, at tað er blivið alsamt tyngri at reka eitt fótbóltslið í fremstu røð.

Maiken Poulsen, sum hevur verið kassameistari, tók seg úr nevndini, og fyri hana og Kjartan vóru valdir Sjúrður Norðbúð og Mikkjal Helmsdal.

Eftir aðalfundin skipaði nýggja nevndin seg við Sjúrður Norðbúð sum formanni. Judith Eysturoy er næstformaður, Símun Midjord kassameistari, og Hannis Egholm skrivari.

### Virkin B36'ari

53 ára gamli Sjúrður Norðbúð hevur verið virkin í B36 í nógv ár. Sjúrður varð føddur í Klaksvík, men hann hevur búð nógv ár í Havn, umframt at hann eisini hevur verið uttanlands eitt skifti.

Sjúrður hevur spælt við 1. deild hjá B36, hann hevur havt ymisk ábyrgdarstørv í felagnum, og hann var eisini dómari í fleiri ár.

Nú skal Sjúrður royna seg sum formann í B36.



*Føroyameistararnir í B36 hava fingið nýggjan formann, eftir at Kjartan Mohr hevur takkað fyri seg*

# B36 hevði hall í ársroknskapinum

**Phoenix-málið kostaði á pappírinum 883 tkr., og tað merkti ársroknskapin hjá annars fíggjarsterka felagnum**

ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Óvanligar kapitalútreiðslur á 883 tkr. merktu ársroknskapin hjá B36.

Fótbóltsfelagið var millum teirra í Føroyum, sum mistu munandi peningaupphæddir, tá týska íløgufelagið, Phoenix, í mars mánaði í fjør fór av knóranum.

Í B36 kundu tey tó troysta seg við, at støðan kundi verið munandi verri. Bara fýra mánaðir undan húsaganginum hjá Phoenix valdi B36 nevnliga at taka 635 tkr. heim av tí, sum stóð á konto í Týsklandi. Hartil fær felagið 149 tkr. úr týska garantigrunninum, og soleiðis hevur felagið hóast alt fingið 784 tkr. aftur av milliónini, sum á sinni varð sett í Phoenix íløguprógv. Restin av missinum var soleiðis bókað rentuinntøka, sum altso ikki var pappírið vert, sum hon var skrivað uppá.

Sjálvur raksturin hjá B36 gav annars eitt lítið yvirskot. Aðrenn kapitalpostar var úrslitið positivt við 89 tkr. Talan er eisini framhaldandi um eitt sera væl konsoliderað felag. Eginognin er á seinasta roknskapinum góðar 4,2 mió kr.

# 38 nýggir B1-venjarar

**Fótbóltssambandið hevði um vikuskiftið seinna partin av B1-venjaraskeiðnum, og heili 38 venjarar gjøgnumførdu skeiðið hesaferð**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Stórur áhugi er fyri at taka venjaraútbúgvingina hjá Fótbóltssambandinum, og um vikuskiftið fóru 38 venjarar ígjøgnum fyrsta partin av B-útbúgvingini. Skeiðið var hildið í Havn og á Toftum samstundis, tí pláss var ikki fyri at hava allar luttakararnar á sama staði.

Skeiðsleiðarar í Eystur-oynni vóru Jóahn Nielsen, Petur Simonsen og Hans Mourits Foldbo. Í Havn vóru Eli Hentze, Jógvan Martin Olsen og Bjørn Krog skeiðsleiðarar.

Skeiðiðini eydnaðust sera væl og vóru bæði luttakararnir og skeiðs-leiðararnir sera væl nøgdir, skrivar heimasíðan hjá Fótbólts. sambandinum

### 21 í Havn

21 venjarar tóku skeiðið í Havn. Teir vóru: Jan C. Dam, Jóhannis Joensen og Laurits í Króki (HB), Niels Petur Fagraberg, Regin Fjallsbak og Jóhan á M runi (MB), Bjarni Johannesen, Jacob Skaaning og Jón Pauli Olsen (VB), Alexander Da Silva Braga (FSV 2004), Hans Fróði Hansen (LÍF), Lennard Pedersen, Jákup L. Stenberg, Niels Chr. Nielsen, Jónas Stenberg, Rúni Nolsøe, Bjartur Nolsøe og Jóhan M. Stenberg (AB), Áki Davidsen og Jákup Thomsen (B36) og Samson Nesá (GÍ)

### 17 á Toftum

Í Eysturoynni gjøgnumførdu hesi 17 skeiðið: Magni Jarnskor, Svenn Ó. Olsen, Hanna Olsen, Mikael Dalbø, Erling Jacobsen, Tummas Justinussen, Davis Dalbø, Petur Thomsen, Anton Skoradal og Lis Justinussen (GÍ), Tórur Djurhuus, Arnfinn Langgaard og Jonhard Hansen (NSÍ), Jón Simonsen (ÍF) og Alexander Djordjevic,



Lesið Sosialin so eru tit við